SPEKT | løggildir grannskoðarar

ARKIV

Búnaðargrunnurin

Ársroknskapur fyri 2008

Starvegur 17 · Postboks 3258
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands

Telefon +298 34 34 34
Telefax +298 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Sp/f. no. 2732

Innihaldsyvirlit

Upplýsingar um grunnin	2
Ársfrágreiðing	4
Roknskaparátekning leiðslunnar	7
Átekning frá óheftum grannskoðara	8
Nýttar roknskaparreglur	9
Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 2008	10
Fíggjarstøða 31. desember 2008	11
Notur	13

Upplýsingar um grunnin

Búnaðargrunnurin
Postboks 50
R. C. Effersøesgøta 4
110 Tórshavn

Telefon 35 35 80
Telefaks 35 35 81

Roknskaparár nr. 4

Heimstaður: Tórshavn

Stýrið

Valdir limir:

Elisabeth Eldevig, forkvinna
búskaparfrøðingur

Bjørn á Heygnum, næstformaður
advokatur

Niels Th. Pedersen
maskinmeistari

Marion á Lakjuni
cand.polit.

Anna Rubeksen
bóndi

Varalimir:

Katrina Maria Johannesen
løgfrøðingur

Óluva J. Midjord
yrkislærd búnaðarkvinna

Heðin D. Poulsen
løgfrøðingur

Jónfinn Thomsen
advokatur

Sigert Patursson
bóndi

Stjórn

Sjúrður Knudsen

Upplýsingar um grunnin

Grannskoðan

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Peningastovnar

P/F Føroya Banki
Eik Banki
Norðoya Sparikassi
Suðuroyar Sparikassi
Landsbankin
Jyske Bank

Ársfrágreiðing

Virksemi
Endamál Búnaðargrunnsins er at veita lán til landbúnaðin og at fíggja kostnaðin av at reka jarðarumsitingina (Búnaðarstovuna) sambært løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 um Búnaðargrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 27 frá 30. apríl 2007.

Herumframt umsitur grunnurin festikontur og kontur fyri mist vetrarbit og stendur fyri allari innkrevjing av festileigum, traðarleigum og øðrum leigum.

Ársúrslitið

Inntøkurnar í 2008 eru 5.963 tkr. móti 9.305 tkr. árið fyri, og er hetta ein minking upp á 3.342 tkr. Minkingin stavar í høvuðsheitinum frá eini minni inntøku frá lánsbrøvum. Eisini er ein lítil minking í rentuinntøkum av innistandandi peningi. Meira um hetta longur niðri á síðuni.

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar hækkaðu við 403 tkr. úr 5.179 tkr. í 2007 til 5.582 tkr. í 2008. Nógv tann størsti parturin stavar frá umvæling av bygninginum hjá grunninum. Bygningurin við garði er málaður allur sum hann er uttan, umframt at øll miðhæddin er sett í stand og málað.

Úrslitið aftaná avskrivingar og avseting móti tapi upp á skuldarar er 1.949 tkr. í 2008 móti 3.769 tkr. í 2007. Hetta er ein minking upp á 1.820 tkr. og stavar frá omanfyrinevndu broytingum umframt afturførdum avsetingum upp á 1.568 tkr.

Útlánini eru vaksin við 10.708 tkr. úr 84.576 tkr. til 95.284 tkr. og kemur hetta av vøkstri í útlánum og afturførdum avsetingum. Eftirstøðurnar eru ikki vaksnar í árinum.

Lánsbrøvini hava ikki givið líka gott avkast seinastu árini sum tey fyrstu árini frá 2001, tá ið byrjað var at seta pening í lánsbrøv. Sum øllum kunnugt var 2008 eitt vánaligt ár fyri íløgumarknaðin, og sæst tað eisini aftur í roknskapi grunsins.

Hóast íløgurnar í lánsbrøv høvdu tað trupult í 2008, avgjørdi grunnurin ikki at flyta peningin á avtaluinnlán fyrr enn statsgarantiurin (bankapakki 1) kom 1. oktober 2008. Hetta fyri at tryggja ognir grunsins á besta hátt, havandi í huga tann ótryggleika, ið tá valdaði millum peningastovnarnar.

Hóast hetta gav peningaogn grunsins eina rentuinntøku upp á 1.572 tkr. umframt inntøkur av útlánum.

Samanumtikið má sigast, at tað hevur verið ein góð loysn at keypa lánsbrøv, bæði tá ið hugsað verður um avkast og trygd. Eisini skal sigast, at íløgurnar fyrra hálvár 2009 hava kastað munandi meira av sær enn í 2008.

Niðanfyri eru talvur, sum vísa gongdina á lánsbrøvum frá byrjan í 2001 til ultimo 2008:



	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	Miðal
Ognarrøkt	5,80%	6,93%	4,30%	3,10%	3,00%	3,00%	3,60%	-0,06%	3,71%
EFFAS 1-5	5,80%	7,00%	4,21%	4,50%	2,87%	0,74%	3,22%	3,19%	3,94%
Innlán	3,60%	2,95%	2,15%	2,15%	2,40%	3,19%	4,27%	4,81%	3,19%



	Byrjan	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008
Ognarrøkt	100,00	105,80	113,13	117,99	121,65	125,30	129,08	133,70	133,62
EFFAS 1-5	100,00	105,80	113,21	117,97	123,28	126,62	127,76	131,87	136,08
Innlán	100,00	103,60	106,66	108,95	111,29	113,98	117,80	122,62	128,52

- Innlán (grønur litur) svarar til, at peningurin varð settur á innlánskontur við hægst møguligari rentu til eina og hvørja tíð, ella tað sum eisini kallast DK Repo renta.

- Effas 1 – 5 (reyður litur) svarar til lánsbrævamarknaðin, ella eitt sokallað indeks, sum okkara íløgur í lánsbrøv vera samanhildin við.

- Ognarrøkt (bláur litur) eru lánsbrøvini hjá Búnaðargrunninum.

Ovara myndin vísir rentuna p.a. fyri hvørt árið sær frá 2001 til 2008 og miðal rentuna fyri sama tíðarskeið. DK Repo hevur í miðal givið 3,19%, meðan lánsbrøvini hava givið 3,71% í miðal fyri tíðarskeiðið.

Niðara myndin vísir eina samanlegging (akkumulering) av hvussu nógvar krónur hvørt lánsbræv á 100 kr. hevur kastað av sær fyri árini 2001 til 2008. T.v.s. at lánsbrøvini hava givið 33,62 kr. fyri hvørjar 100 kr., meðan DK Repo hevði givið 28,52 kr. fyri hvørjar 100 kr. í sama tíðarskeiði.

Tøkur peningur er hækkaður úr 68,7 mió.kr. í 2007 til 108,3 mió.kr. í 2008. Stóra hækkingin stavar frá sølu av jørð og fyri langt tann størsta partin, at lánsbrøvini eru minkað og sett í avtaluinnlán, eftir at bankapakki 1 kom í gildi.

Grunnurin er vaksin úr 109,2 mió.kr. til 111,1 mió.kr. Hetta kemur av rakstraravlopinum.

Festikontan er vaksin úr 172,2 mió.kr. til 184,4 mió.kr. Hækkingin stavar frá jarðarsølu. Her skal viðmerkjast, at týðandi upphæddir eru játtaðar av festikonto og vera útgoldnar fyri íløgur, sum eru í gerð hjá festarum. Hesar verða væntandi útgoldnar komandi 1-2 árini.

Viðmerkjast skal, at av nevndu 184,4 mió.kr. hoyra 12,5 mió.kr. til konto fyri mist vetrarbit. Eisini skal viðmerkjast, at lógin fyri vetrarbit er broytt í mai 2009, soleiðis at mist bit fyri ognarhagar ikki longur verður goldið á konto í Búnaðargrunninum, men beinleiðis til eigaran. Eisini er lógin broytt, soleiðis at tann parturin, sum hoyrir til landsjørð, hevur fingið aðrar treytir fyri at fáa pening útgoldnan.

Hendan lógarbroyting kemur at hava við sær, at tað ikki verður goldin eins nógvur peningur á konto í Búnaðargrunninum fyri mist vetrarbit í framtíðini, sum undanfarin ár.

Grunnurin hevur gjørt uppskot til broyting av treytunum fyri figging av festikonto, soleiðis at peningurin á festikonto í størri mun kann koma øllum landbúnaðinum í landinum at gagni og ikki sum støðan er í dag, har tað bert eru nøkur fá festir í miðstaðarøkjunum, sum standa fyri langt størsta partinum av peninginum og serliga útjaðarin ikki hevur møguleika at fáa pening av festikonto.

Eisini hevur grunnurin skotið upp, at partar av peninginum kann nýtast til kanningar og nýggjar verkætlanir, sum kunnu koma samlaða landbúnaðinum til gagns.

Uppskotið er til viðgerðar hjá landsstýrismanninum.

Peningaviðurskifti:

Fíggjarjavnin er 298.392 tkr. Av hesum er eginpeningurin 295.561 tkr., sum svarar til 99,1%.

Roknskaparátekning leiðslunnar

Stýrið og stjórn hava í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin og ársfrágreiðingina fyri 2008.

Roknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við galdandi roknskaparásetingar. Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætt-vísandi mynd.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar.

Tórshavn hin 6. oktober 2009

Stjórn:

Sjúrður Knudsen

Stýrið:

Elisabeth Eldevig *forkvinna*	Bjørn á Heygum *næstformaður*	Heðin D. Poulsen
Marion á Lakjuni	Anna Rubeksen	

Góðkendur á fundi stýrisins, hin / 2009

Fundarstjóri:

Átekning frá óheftum grannskoðara

Til stýrið í Búnaðargrunninum
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Búnaðargrunninum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2008.

Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við nýttu roknskaparreglurnar. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapur kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttar verða hóskandi roknskaparreglur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at grunnurin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd, hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparreglurnar, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

Niðurstøða
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2008 og av úrslitinum av virksemi grunsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2008 samsvarandi nýttu roknskaparreglunum.

Tórshavn hin 6. oktober 2009
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Mirjam Haraldsen
statsaut. revisor

Nýttar roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri Búnaðargrunnin er, eins og undanfarna ár, gjørdur eftir teimum roknskaparreglum, sum eru lýstar niðanfyri.

Inntøkur

Leiguinntøkur og rentur av lánum verða inntøkuførdar sambært útsendum rokningum.

Rentur av innistandandi peningi verða inntøkuførdar, tá ið tær verða tilskrivaðar í peningastovnum.

Útreiðslur

Útreiðslur verða tiknar við í tí roknskapartíðarskeiði tær viðvíkja.

Materiell støðisogn

Keyp av materiellari støðisogn verður útreiðsluførd í útveganarárinum.

Útlán og eftirstøður

Útlán og eftirstøður verða upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskriving ímóti tapi. Upphæddirnar verða mettar hvør sær.

Onnur áogn

Onnur áogn verður upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskrivingum ímóti tapi.

Lánsbrøv

Lánsbrøv verða upptikin til kursvirði við ársenda.

Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 2008

	Nota	2008	2007
		kr.	kr.
Leiguinntøkur, netto	1	154.687	141.390
Rentuinntøkur v.m.	2	5.529.963	8.836.988
Sakarmálsgjøld		277.992	326.998
Inntøkur til samans		5.962.642	9.305.376
Umsiting	3	-508.638	-553.313
Húsarakstur	4	-499.758	-161.936
Starvsfólkaútreiðslur	5	-1.769.093	-1.751.299
Innbúgv v.m.	6	-104.260	-12.686
Búnaðarstovan		-2.700.000	-2.700.000
Úrslit áðrenn avsetingar		380.893	4.126.142
Javning í avseting til tap upp á skuldarar		1.568.000	-357.000
Ársúrslit		1.948.893	3.769.142

Fíggjarstøða 31. desember 2008

	Nota	2008	2007
		kr.	kr.
OGN			
Støðisogn			
Materiell støðisogn		0	0
Støðisogn til samans		0	0
Ogn í umferð			
Áogn			
Útlán og eftirstøður	7	95.284.216	84.576.337
Onnur áogn	8	454.498	389.656
		95.738.714	84.965.993
Lánsbrøv		94.372.913	130.554.576
Tøkur peningur	9	108.280.642	68.739.490
Ogn í umferð til samans		298.392.269	284.260.059
OGN TIL SAMANS		298.392.269	284.260.059

Fíggjarstøða 31. desember 2008

	Nota	2008	2007
		kr.	kr.
SKYLDUR			
Eginpeningur			
Grunnurin	10	111.133.791	109.184.898
Festikontur	11	184.409.939	172.226.674
Kolagrevstrargrunnurin		16.803	16.804
Eginpeningur til samans		295.560.533	281.428.376
Skuld			
Stuttfreistað skuld			
Onnur skuld	12	2.831.736	2.831.683
Skuld til samans		2.831.736	2.831.683
SKYLDUR TIL SAMANS		298.392.269	284.260.059
Eventualskyldur og veðsetingar	13		

Notur

1 Leiguinntøkur

	2008	2007
	kr.	kr.
Festileiga	26.952	26.959
Traðarleiga	98.135	90.831
Festigjøld við skifti	26.700	23.600
Onnur leiga	2.900	0
	154.687	141.390

2 Rentuinntøkur v.m.

Rentur av útlánum	3.034.154	2.787.725
Rentur og kursjavningar av lánsbrøvum	-158.187	3.372.770
Rentur av innistandandi peningi o.a.	1.571.876	1.678.127
Rentur av eftirstøðum	1.082.120	998.366
	5.529.963	8.836.988

3 Umsiting

Veðhavaralýsingar	-1.200	0
Løgfrøðilig hjálp	85.944	49.500
Serkøn hjálp	35.950	23.540
Innheintingarkostnaður	19.044	0
Postgjald	13.522	13.215
Grannskoðan	74.000	75.000
Roknskaparhjálp v.m.	16.600	26.265
Trygging	17.207	2.049
Tinglesing	-38.446	12.829
Ymiskt	44.373	40.843
Námsferðir	0	0
Edv-útreiðslur	13.979	7.469
Bókaútgáva	-3.830	0
Telefon	32.088	27.701
Internet	33.577	28.317
Haldaragjald, bløð o.a.	15.020	18.111
Framtíðarlandbúnaður	0	0
Serkøn hjálp - Landbofyn	56.846	156.043
Aðrar skrivstovuútreiðslur	93.964	72.431
	508.638	553.313

Notur

4 Húsarakstur

	2008	2007
	kr.	kr.
Viðlíkahald	0	16
Reingerð o.a.	55.926	47.880
Ljós og hiti	56.666	26.782
Trygging av ognum	0	14.711
Urtagarðurin	70.544	54.597
Kavarudding v.m.	4.520	0
Umbygging av skrivstovuni	287.241	0
Ávaringarskipan	14.200	12.000
Húsavarðatænastan	10.661	5.950
	499.758	161.936

5 Starvsfólkaútreiðslur

Lønir	1.221.117	1.205.979
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur	27.241	10.329
Arbeiðsloysistrygging	15.563	15.104
Barsilsskipanin	9.605	10.042
Eftirlønargjald	168.543	162.174
Lønir og lønargjøld til samans	1.442.069	1.403.628
Dagpeningur, Stýrið	306.861	330.109
Ferðapeningur, Stýrið	20.163	17.562
	1.769.093	1.751.299

6 Innbúgv v.m.

Innbúgv	104.260	12.686
	104.260	12.686

Notur

7 Útlán og eftirstøður

	2008	2007
	kr.	kr.
Ymiskar útlánskontur	113.938.292	104.984.621
Avdráttir og rentur, fallin til gjaldingar	32.305.728	32.134.773
Fallin festi- og traðarleiga	59.196	43.943
Avsett til tap	-51.019.000	-52.587.000
	95.284.216	84.576.337

8 Onnur áogn

Mvg-áogn	292.713	261.242
Onnur áogn	161.785	128.414
	454.498	389.656

9 Tøkur peningur

Kassapeningur	1.356	2.303
P/F Føroya Banki	28.781.192	30.443.666
P/F Eik Banki	69.552.338	29.034.646
Suðuroyar Sparikassi	222.217	184.785
Norðoya Sparikassi	4.321.159	3.956.824
Landsbankin	5.209.480	5.036.463
Jyske Bank	138.835	0
Postgiro	54.065	80.803
	108.280.642	68.739.490

10 Grunnurin

Salda 1. januar	109.184.898	105.415.756
Rakstraravlop	1.948.893	3.769.142
	111.133.791	109.184.898

Notur

11 Festikontur

	2008	2007
	kr.	kr.
Salda 1. januar	172.226.674	154.476.117
Søla av jørð	10.814.638	15.085.332
Inngoldið fyri vetrarbit	167.109	1.580.811
Inngoldið fyri vetrarfriðing	0	1.460.248
Inntøka av grótbrotum	1.083.419	681.589
Frábýtisútreiðslur	0	0
Leiga	501.585	379.248
Alistøðir	289.498	386.813
Annað endurgjald	14.100	0
	185.097.023	174.050.158
Útgoldið, netto	-687.084	-2.688.221
Festikontur 31. desember	184.409.939	171.361.937
Ikki sundurgreinað inngjøld	0	864.737
	184.409.939	172.226.674

12 Onnur skuld

Skyldugar útreiðslur – Búnaðarstovan	2.700.000	2.700.000
Studningur samlikonta	53	0
Skyldugar útreiðslur – Føroya Gjaldstova	131.683	131.683
	2.831.736	2.831.683

13 Eventualskyldur og veðsetingar

Ongar veðsetingar hvíla á grunninum.